# Fyri aðru ferð endar heiðurin í Leirvík




**ÁRSINS VIRKI** Hetta er aðru ferð, síðan Vinnuhúsið fór at velja ársins virki, at eitt virkið í Leirvík hevur vunnið hendan heiður. Í 2005 varð tað Høvdavirkið, sum varð kosið at vera ársins virki – og á vinnudegnum fríggjadagin endaði heiðurin hjá Tavuni í Leirvík

Vilmund Jacobsen

Tá Høvdavirkið í 2005 gjørdist ársins virki í Føroyum, brúktu vit yvirskriftina, at "Leirvíkingar brúktu høvdið". Men tað er ikki bara á Høvdavirkinum, at leirvíkingar brúka høvdið. Tað hava tey so sanniliga eisini gjørt á gulllaksavirkinum Tavuni, sum á vinnudegnum seinasta fríggjadag varð kosið at vera ársins virki í ár. Hetta er soleiðis aðru ferð í bara fimm ár, at virkir í Leirvík fáa henda mikla heiður millum mong virkir í Føroyum.

Ikki minni áhugavert er tað, at bæði Høvdavirkið og Tavan í Leirvík kunnu sigast at vera ótraditionell virkir í mun til okkara vanligu flakavinnu úr vanliga kendum fiskasløgum.

### Duga í Leirvík

Á Høvdavirkinum hava tey dugað at virðisøkt og tjent pengar burtur úr tí, sum vit kunnu rópa fiskaslógvi, høvdum og ryggjum – og á Tavuni hava tey dugað betri enn onnur at tjena pengar og skapt gevandi vinnu úr gulllaksi, sum hevur verið trupult hjá øðrum virkjum í Føroyum, tó at fleiri royndir hava verið gjørdar.

Meðan mong virkir í Føroyum hava hingið við rumpuni í vatnskorpuni – og summi væl lægri enn tað, eydnaðist tað Tavuni í fjør at koma við einum avlopi upp á næstan 11 miljónir krónur, sum má sigast at vera serstakliga flott.

Føroysk fiskaframleiðsla hevur seinnu árini ikki verið hon, ið hevur givið tann nógva peningin. Heldur hevur tað verið ein kampur um at halda nøsini úr vatnskorpuni.

Hesi somu ár hevur tað kortini eydnast teimum, sum reka og arbeiða á Tavuni í Leirvík at koma við avlopum, sum seinastu fimm árini hava ligið úr 2,6 miljónum krónum upp í 10,8 miljónir krónur um árið.

Í samrøðu við Sosialin hevur stjórin á Tavuni onkuntíð sagt, at tey duga ikki betri enn onnur – ella, at "vit duga einki, sum onnur ikki duga..."

Men sikkurt og vist er, at okkurt duga tey á Tavuni, sum onnur í hvussu er ikki hava dugað líka væl.

### Eitt herðaklapp

Tá Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni, tók ímóti heiðurinum á vinnudegnum fríggjadagin, helt hann lítillátin fyri, at tað er stuttligt at fáa eitt herðaklapp. Hann helt, at hugskotið at velja ársins hetta og hatta innan føroyskt vinnulív er gott og soleiðis eisini innan okkara skipavinnu.

– Eingin undrar seg so nógv yvir hesa gongd, sum verið hevur á Tavuni, síðan vit byrjaðu hesa framleiðslu í 1994, sum eg sjálvur.

Í stuttum greiddi hann frá søguni aftanfyri virkið og segði, at teir í 1994 gjørdu av at leiga gamla flakavirkið Frost beint eftir kreppuna, sum hevði lagt so stóran part av føroyskum vinnulívið lamið.

– Fleiri, sum høvdu arbeitt á gamla flakavirkinum, komu í arbeiði hjá okkum, og tey vóru fegin um at sleppa í gongd aftur. Vit merktu beinanvegin ein fantastiskan anda og ídni millum fólkið til at fáa hetta at bera til. Hendan anda og hetta ágrýtni hevur vart til hendan dag, segði hann.

Jóan Magnus Ramussen segði, at arbeiðsfólkið á Tavuni eigur ein stóran lut í, at tað hevur gingist teimum so væl.

– Uttan hesi dugnaligu fólk og góðu leiðslu á øllum postum hevði hetta ikki havt

# Fallið hjá Eik merkti dagin

**VINNUDAGUR** At stóri fíggjarrisin í føroyska samfelagnum Eik Banki fall júst dagin fyri vinnudagin í ár, kundi illa tigast burtur, tá dagurin varð settur í Norðurlandahúsinum seinasta fríggjadag

Vilmund Jacobsen

Í síni vælkomstrøðu til vinnudagin nevndi formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Jóhan Páll Joensen, fallið hjá Eik Banka og landsstýrismaðurin, sum setti hendan dagin, Jóhan Dahl, gjørdi so mikið meiri burturúr.

Jóhan Páll Joensen visti á, at myrk skýgg hava hingið yvir okkum seinastu dagarnar og segði, at hesi eru ein sera stór avbjóðing, sum eingin misunnir teimum, ið nú sita við hesum.

Hann setti eisini spurningin, hvat vit kunnu gera fyri at rætta teimum, sum sita við hesum trupulleikum, eina hond.

– Vit kunnu ikki gera nógv annað enn við nærlagni og vilja at arbeiða fyri at fáa eitt sterkt vinnulív, og soleiðis eisini ein sterkari føroyskan búskap.

### Niðurgjørd sjónarmið

Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag gjørdi eisini nokso fitt burtur úr sitandi landsstýri og samgongu.

– Vit hava eina samgongu, sum mest av øllum er bókhaldari og roynir at hóra undan hallinum sum frægast

Hann visti á, at uppskot av handa hógv stinga seg upp og verða sett í verk uttan veruliga at vita, hvørjar avleiðingarnar av hesum eru. Saklig og faklig sjónarmið verða niðurgjørd og ikki tikin við í avgerðirnar.

– Vit hugsa stutt og trívast betri við øll at sita á somu køku, sum gerst minni og minni, legði hann aftrat.

### Mala í ring

Jóhan Páll Joensen segði, at tað er eitt stórt tak at skipa fyri vinnudegnum, sum í ár hevði spurningin í síni yvirskrift, um Føroyar bara mala í ring.

– Tiltakið skal vera gevandi og áhugavert, og tað er ein avbjóðing ikki at mala í ring.

Hann vísti á, at spyrt tú í Vinnuhúsinum, um Føroyar mala í ring, er svarið ja.

– Eingin ivi er um, at vit í Føroyum mala í ring, legði hann aftrat.

Jóhan Páll Joensen helt, at viljin til at taka neyðug tøk fyri at skipa samfelagið, soleiðis at mest fæst burturúr, er ikki til staðar.

### Fíggjarrisin fall

Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, segði í síni setanarrøðu, at ein fíggjarrisi er fallin í føroyskari vinnulívssøgu.

– Sterka eikin er rivin upp við rót. Størsti føroyski bankin og elsta fyritøka í Føroyum er ikki til longur.

Landsstýrismaðurin ásannaði, at eitt stórt tómrúm stendur eftir Eik Banka.

– Uttan iva hava vit øll okkara meiningar um tilburðin. Hvat hendi - og hví endaði hetta so galið?

Landsstýrismaðurin helt fyri, at hetta eru náttúrligir spurningar at seta sær.



*Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl, setti dagin og brúkti fitt av tíð til at tosa um fallið hjá Eik Banka*

*Mynd: Jens Kristian Vang*